# Vestmanna kann vinna FM á heimavølli

**Leygardagin 4. mars verður seinasta umfar í liðkappingini í talvi í bygdarhúsinum í Vestmanna. Vestmenningar liggja á odda, og teir kunnu tí tryggja sær gullið á heimavølli um eina góða viku**

TALV
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Liðkappingin í talvi gongur ímóti endanum, og sum vanligt er, verður seinasta umfarið í liðkappingini telva sama dag á sama stað.

Hesaferð verður Vestmanna vertur fyri seinasta umfarinum, og tað passar ivaleyst vestmenningum sera væl, tí teirra besta lið liggur á odda í bestu deildini í talvi.

Vestmenningar eru hálvt stig frammanfyri Havnina undan seinasta umfarinum, og skal Havnin taka FM frá Vestmanna, skulu teir í Havn hava eitt stig meira enn Vestmanna í seinasta umfarinum.

### Vestmanna hevur havt munin

Kappingin í ár hevur staðið ímillum Vestmanna Talvfelag og Havnar Telvingarfelag, og í innanhýsis dystunum ímillum liðini hava vestmenningar ligið omaná, tó við minst møguligum muni. Men júst hesin lítli munur kann gerast avgerandi, tá ið avtornar.

Í 1.deild er Vestmanna Talvfelag eitt hálvt stig framman fyri Havnar Telvingarfelag, men av tí at Vestmanna Talvfelag hevur betur dystarstig (2 stig fyri vunnan dyst, 1 stig fyri javnan), má Havnar Telvingarfelag 1 stig fram um Vestmanna Talvfelag.

Og royndirnar siga, at júst slíkt kann henda á seinasta degnum, tá ið nervar standa upp á spæla, og FM skal fáa hesim.

Í fjør tók Havnar Telvingarfelag í seinasta umfarinum Klaksvíkina aftur, hóast teir í Klaksvík høvdu ligið á odda og lógu til at vinna FM.

### Spennandi í botninum

Tað er eisini sera spennandi í botninum, har aftasta liðið flytir niður í 2. deild. 4 lið liggja soleiðis fyri, at tey kunnu flyta úr deildini, og tað er merkisvert, at tey bæði liðini hjá Klaksvíkar Talvfelag liggja aftast og næstaftast.

Hetta kemst millum annað av, at Klaksvík í ár ikki hevur lagt alla orku í at savna eitt sterkt lið, men hevur góðar telvarar á báðum liðum.

Í seinasta umfari skulu tey bæði liðini úr Klaksvík dystast við Streym og Kollafjørð um, hvat lið skal flyta niður.

Seinasta umfar verður telvað í Vestmanna leygardagin 4. mars.

# NSÍ og Norðoya Sparikassi næstu fimm árini

**Fyrrapartin skrivaðu NSÍ og Norðoya Sparikassi undir ein fimm ára stuðulssáttmála, tryggjar leiðsluni í NSÍ arbeiðsfrið næstu árini, samstundis sum Norðoya Sparikassi fær fótin innum í økinum. Báðir partar vænta sær nógv av nýggja samstarvinum**

FÓTBÓLTUR
*Tíðindaskriv*




*Eyðfinn Reyðberg og Andrias Lamhauge skriva undir næyggju sponsoravtaluna*

Sunnudagin 2. apríl tekur NSÍ ímóti KÍ við Løkin í fyrsta landskappingardystinum í ár, og dagin eftir, mánadagin 3. apríl, letur Norðoya Sparikassi upp nýggja deild í Runavík.

At Norðoya Sparikassi ætlar nakað við »innrásini« á Skálafjørðinum og í Eysturoynni, varð staðfest fyrrapartin í býráðssalinum í Runavík, tá Andrias Lamhauge, formaður í NSÍ, og Eyðfinn Reyðberg, stjóri í Norðoya Sparikassa, skrivaðu undir ein fimm ára stuðulssáttmála.

– Tað hevur nógv at siga fyri okkum, at vit kunnu fáa sáttmála við eitt vinnandi lið, og eitt slíkt er NSÍ. Og eg vænti eisini, at NSÍ kann gerast uppaftur meira vinnandi, tí felagið er so vælskipað og hevur so gott spælaratilfar at arbeiða við, staðfesti Eyðfinn Reyðberg, tá hann hevði sett sína undirskrift á n‡ggja stuðulssáttmálan.

– Síðani hetta samstarvið kom upp á tal, havi eg upplivað NSÍ júst so professionelt, sum eg hevði væntað. Alt tað, sum eg veit um, hevur NSÍ eisini havt eitt fyrimyndarliga gott ungdómsarbeiði, og júst tað er óivað lykilin til, at felagið í ár er ein av favorittunum at gerast føroyameistari.

### Størri orku í ítróttin

Minst líka væl nøgdur var formaðurin í NSÍ, Andrias Lamhauge, tá hann vegna felagið hevði sett undirskrift undir longsta stuðulssáttmálan, felagið nakrantíð hevur havt, tí hesin gongur yvir fimm tey næstu árini.

– Vit hava stórar ambitiónir, og tá hevur tað nógv at siga at fáa ein góðan sáttmála, ið røkkur yvir fleiri ár, so størri arbeiðsfriður fæst til at leggja orkuna í sjálvan ítróttin. Nú sleppa vit frá at hugsa so nógv um fíggjarspurningin, sum vit onkuntíð hava gjørt, tí hann er lagdur í ein fastan og drúgvan karm, sigur Andrias Lamhauge.

– Fyri okkara viðkomandi er Norðoya Sparikassi ein spennandi samstarvspartnari, og vit síggja stórar møguleikar í samstarvinum. Ikki minst var tað eisini hugaligt, at tá vit vendu okkum til teirra, var mestsum leyst og liðugt beinanvegin, og tí kunnu vit nú staðfesta samstarvið.

Formaðurin í NSÍ vísir á, at felagið í komandi kappingarárinum hevur tilsamans 23 lið við í teimum ymsu kappingunum, og at tað tí eru nógvir brikkar, sum skulu fáast upp á pláss í felagsarbeiðinum.

– Um vit fyrst taka árið í ár, so haldi eg, at vit hava ein góðan og breiðan hóp til Formuladeildina, umframt at vit eisini fara at stíla høgt í øðrum deildum, sigur Andrias Lamhauge, ið loyvir sær at hyggja enn longur fram.

– Næsta ár eru 50 ár liðin, síðani NSÍ var sett á stovn, og tað ætla vit sjálvandi at markera á ymsan hátt, so eg kann bara endurtaka, at tað hevur øgiliga nógv at siga fyri okkum, at vit hava eitt gott fíggjarligt bakland.

### Onnur tiltøk við

Umframt at NSÍ gjørdi stuðulssáttmáli við Norðoya Sparikassa, vórðu eisini aðrir sáttmálar undirskrivaðir í býráðssalinum í Runavík fyrrapartin, tí umframt høvuðsstuðul hevur arbeiðið í einum stórum og virknum felag eisini brúk fyri øðrum stuðlum.

Millum annað eru tvey ára sáttmálar gjørdir við EM Asfalt, Teymavirkið og Kall, og fevna hesir sáttmálar um ymisk virkisøki. Til dømis er Teymavirkið klædnastuðul hjá felagnum, og Kall skal stuðla einari n‡ggjari sending, Vespurásin, ið verður send á Rás 2 fríggjadagar tey vikuskiftini, tá NSÍ spælir dystir í Formuladeildini.

– Ætlanin er, at henda útvarpsrásin hjá okkum, ið helst fer at koyra eftir nøkulunda sama leisti sum HB-rásin, skal eita Vespurásin, og ætlandi skulu tvey fólk taka sær av hesum sendingunum, ið fara at gera tað munandi lættari hjá okkum at røkka út til bæði viðhaldsfólk og onnur áhugað, sigur Andrias Lamhauge, NSÍ-formaður, at enda.

# Bólkaspælið liðugt

Sum er, so líkjast hálvfinalurnar í kvinnukappingini dystum millum Neistan og Kyndil og Stjørnuna og VB. Ein samanseting, sum tó kann broytast, megnar Kyndil at vinna á Neistanum, tá liðini hittast sunnudagin.

Á pappírinum eru bláu steypavinnararnir tó stórfavorittar. Ikki minst, nú úrslitini hava verið so góð seinnu dystirnar. Kyndil fekk hinvegin eitt lyft við sigrinum á VB, og tær hava eisini fyrr í ár givið Neistanum harða mótstøðu, so útilokast kunnu tær á ongan hátt.

Vinnur Neistin dystin í Havn, so er dysturin í Vági, sum ikki verður spældur fyrr enn um eina viku, at kalla týdningarleysur, tí tá skulu Stjørnan og VB undir øllum umstøðum spæla hálvfinalu móti hvørjum øðrum.

Hinvegin vilja báðir partar hava nakað at spæla fyri, um Kyndil aftur ger ein vørr hesaferð. Tá kann Stjørnan við sigri fara á oddasessin, og á tann hátt fáa “lættaru” hálvfinaluna. Men hendan vil tá eisini verða móti VB, tí tær tá enda undir Kyndli.

**-mørk**

## Jón Rói spælir aftur

Um vikuskiftið skal Jón Rói Jacobsen aftur á vøllin fyri AaB. Jón Rói fekk fyri nøkrum vikum síðani ein skaða í knæið, men løstur var tí betur ikki álvarsamur. Nú skal Jón Rói royna seg aftur í dysti, tí hann er millum spælararnar, sum verða við á Danmarksseriuliðnum hjá AaB, sum spælir venjingardyst um vikuskiftið. Jón Rói hevur vant saman við liðfeløgunum seinasta vikuna, og hann hevur eisini fingið serliga uppvenjing fyri skaðan. Súni Olsen er tikin út til seinasta venjingardystin hjá superligaliðnum, sum skuldi spæla í kvøld.

## Kent stúrir

Felagið hjá Johan Byrial Hansen hevur staðið seg væl í superliguni, eftir at felagið flutti áðrenn hetta kappingarárið. Nú kappingin er komin reiðiliga í helvt, liggur AC Horsens omanfyri niðurflytingarstrikuna, og tað er komið óvart á mong.

Venjarin hjá Byrial og hinum í AC Horsens heldur tó, at enn er felagið langt frá sloppið undan niðurflytingini.

– Vit hava klárað okkum betur, enn fólk høvdu roknað við, men eg haldi framvegis, at møguleikarnir eru størri fyri, at vit flyta niður, enn at vit verða verandi í superliguni, sigur Kent Nielsen við onside.dk

– Vit hava 13 sera truplar dystir fyri framman. Vit skulu spæla upp til okkara besta, um vit skulu yvirliva í deildini, sigur hann.

## FCK fekk bót

FC Keypmannahavn hevur fingið eina bót frá Royal League fyri at hava brúkt ein ólógligan spælara í dystinum ímóti Brøndby tann 9. februar. Ein av spælarunum á liðnum hjá FCK var Atiba Hutchinson, men hansara spæliloyvi var ikki klárt, tá ið dysturin varð spældur. Disiplinernevndin fyri Royal League hevur tí gjørt av, at FCK skal hava eina bót á 50.000 krónur. Feløgini, sum eru partur av málinum, hava nú møguleika at kæra hesa avgerð.